# Jólagudstænasta, veitsla og jólaheilsanir úr Århus





Seinasta sunnudag var jólagudstænasta í Brabrand kirkju í Århus. Tað var føroyingarfelagið í Århus, sum skipaði fyri. Meira enn 100 fólk vóru til gudsdtænastuna, upp, har Borgny prestur talaði, prædikan var um einglar. Umframt jólasálmar var eisini solosangur á skránni. Alt var á føroyskum, so ein føldi seg næstan sum at vera í Føroyum, siga tey úr Århus.

Aftan á guðstænastuna var jólaveitsla í sókargarðinum, har boðreitt var við kaffi og køkum. Dansað var um jólatræið og fingu børnini pakka frá jólamanninum. At enda vórðu jólaheilanirnar innspældar, og verða tær sendar í Útvarpi Føroya tann 22. dec.

- Eitt sera væleydnað tiltak, siga tey úr Århus.

























